# Kjak



Óluva Klettskarð

## Klaksvíkar sjúkrahús – enn einaferð

*At eygleiða ágangin á Klaksvíkar sjúkrahús er sanniliga ikki stuttligt. Eg ivist stórliga, at hetta bert eru bítandi hestar, nú krubban er tóm*

Hetta líkist meiri einfaldastu hugsanini: meir fyri minni, og tí er betur, at alt er í Havn. Ongantíð havi eg hildið meg sjálva verið lokalpolitiska burturav. Men nú haldi eg, okkara fólkavaldu úti um landið áttu at farið til verka. Tí ágangurin økist. Seinasta perlan í ketuni er at lata føðistovuna aftur á Klaksvíkar sjúkrahúsi, tí tað er tryggari at eiga í Havn, har alskyns hentleikar og serfrøði er.

Tað er jú púrasta burturvið at próvføra á henda hátt!

### Barnakonur ikki sjúklingar

Kjakið um útjaðara og miðstaðin er á lágum støði. Men argumentini sigast vera tikin á høgum støði, frá sjálvum tí danska heilsumálaráðnum, sum hevur gjørt ætlan fyri, hvussu danska heilsuøkið best og tryggast verður skipað. Og hetta rakar so eisini føroyska heilsuverkið.

Men tað er fyri tað fyrsta ongin sjúka at eiga barn, men tvørturímóti tað natúrligasta og vónríkasta lívsupplivilsi, menniskjanum unnist. Og jarðarmøður hava alla tíð, føðideildin á Klaksvíkar sjúkrahúsi hevur virkað, sent truplar ella álvarsligar føðingar til Havnar uttan stórvegis hóvastak. Og so hava barnakonur kunnað átt í nærumhvørvinum í tryggum og hugnaligum umstøðum, nær familjuni.

### Tryggleiki, í mun til hvat?

Stjórin á sjúkrahúsinum í Klaksvík fekk ikki annað enn verið samdur við útvarpskonuna, ið spurdi, um tað ikki er tryggari at eiga á Landssjúkrahúsinum. Og hesum kunnu vit øll geva honum rætt í, tí her er serfrøðin savnað. Men ikki at kunna eiga børn í Klaksvík uttan serfrøði, tað er tað sama sum at krevja allar sjúklingar sendar niður á Ríkissjúkrahúsið beinanvegin, tí har er nógv tryggari. Ella kanska allar barnakonur? Tí ov tíðliga fødd børn hava betri framtreytir á serdeild í danska høvuðsstaðnum enn á landssjúkrahúsinum!

### Politiskar loysnir vænta

Føroyskir politikarar skulu ikki bara fylgja donskum álitum. Politikarar skulu føra politikk. Teir skulu siga, hvussu teir vilja hava hetta landið skal síggja út, og hvat økini skulu bjóða sínum borgarum. Og nú er tíð upp á at siga okkum úti um landið, um tað ikki bara er nógv bíligari at øll búgva í Havn... Tí argumentini tykjast vera í krónum og oyrum eina! Eg góðtaki ikki, at heilsuverkið verður skipað eftir donskum leisti. Vit búgva ikki í Danmark, vit búgva í Føroyum, og hetta land má skipast eftir føroyskum leisti.

### Kvinnur stovnsgjørdar

Eg góðtaki ikki, at kvinnur í norðara partinum av landinum skulu stovngerast, tí tær skulu eiga barn. Føðing er náttúrligt fyribrigdi, ja, hjá nógvum kann hetta ganga fyri seg heima, so langt burtur frá stovnum sum gjørligt, sum rákið uttan um okkum er. Og hvat er vunnið, tá jarðarmøðra tænastan skal varðveitast og framvegis skal virka her norðuri, um ungar kvinnur í staðin fara at fáa sær heimaføðing? Tað verður ikki bíligari, tvørturímóti.

At missa slíkan náttúrligan rætt sum at føða barn í nærumhvørvinum, tá vælvirkandi føðideild er á staðnum, eiga kvinnur ikki at góðtaka. Hvørki kvinnur í Norðoyggjum ella í Suðuroy. Nú avgerðin er tikin, so vóni eg, at politikarar taka hesi sjónarmið við í víðari viðgerð, tí seinasta orðið um tey trý sjúkrahúsini er neyvan sagt.

---



Mikkjal Sørensen

## Opið bræv til Rósu Samuelsen, landsstýriskvinnu

*Viðv. ætlaðu uppsagnunum á Suðuroyar Ellis- og Røktarheimi*

Tá politiska arbeiði í sambandi við fíggjarlógina fór fram í september, var undirritaði inni sum varatingmaður.

Vit í javnaðarflokkinum høvdu tveir fundir við teg um støðuna í sambandi við ellisheimini her suðuri, har tann seinni endaði við eini semju, sum tú sendi okkum við telduposti. Eg endurgevi eitt brot, har tú sigur m.a.

„Í sambandi við at Ellis og Røktarheimið í Vági letur upp í 2011, er ætlanin at búfólk, sum í dag búgva á tveymanskamari á røktardeildini á Suðuroyar Ellis- og Røktarheimi, fáa tilboð um at fáa eittmanskamar í Vági ístaðin.

Tillagingin av dupultkømurum til eittmanskømur verður framd líðandi í 2011, so hvørt fólk fella frá ella sjálvboðin vilja flyta til nýggja heimið í Vági tá tað letur upp 1. mei. Lýst verður eftir leiðara og starvsfólkum til heimið í Vági longu nú í heyst, so at møguligt verður hjá verandi starvsfólkum at søkja starv í Vági.„

Vit í javnaðarflokkinum mettu, at soleiðis sum umstøðurnar vóru, kundu vit liva við hesari orðing.

Men tá eg í dag frætti, at fleiri starvsfólk á ellisheiminum hava fingið ætlanarskriv um uppsøgn, má eg staðfesta, at tú hevur ikki hildið tann partin av semjuni um starvsfólkini, og tað kann eg als ikki liva við. Hetta er eitt heilt greitt brot á politisku avtaluna okkara millum.

Eg vil tí hervið heita á teg, um at síggja til, at semjan verður hildin, og at eingin verður uppsagdur, men at starvsfólkini kunnu søkja starv á Ellis- og røktarheiminum í Vági tá tey størvini verða lýst leys, soleiðis sum avtalað varð.

Annars má eg siga, at tað er forkastiligt, at landsstýriskvinnan alment í juli mánaða 2010 fer út við boðunum um at niðurleggja 8 búpláss á Suðuroyar Ellis- og røktarheimi, tí at eitt nýtt heim møguliga letur upp 1. mai 2011, og harvið skapar ótryggleika, bæði fyri búfólk og starvsfólk.

Eg eri ikki ósamdur um, at búfólk framyvir skulu hava hvør sítt kamar, men tá tað hevur koyrt nú soleiðis í eini 30 ár, so ger eitt hálvt ár hvørki til ella frá fyri búfólkini. Hinvegin er hetta ein dyggur frammaná fyri starvsfólkini, sum verða tveitt út í óneyðugar uppsagnir tá tað kundi verið sloppið undan, um málið varð rætt takla við eini natúrligari frágongd.

Eg kann undir ongum umstøðum góðtaka ta viðferð, ið starvsfólkini á Suðuroyar ellis- og røktarheimi hava fingið. Hvørki tað, at tey nú hava fingið ætlanarskriv um uppsøgn, ella at hesi somu fólk hava livað í ótta og ótryggleika nú í eitt hálvt ár.

Tað vóru góð tíðindi tá landsstýrið, umboðandi somu flokkar, kom suður við lyftum um at byggja nýtt ellis- og røktarheim til 24 búfólk, og harvið skapa 40 nýggj arbeiðspláss. Hinvegin eigur hetta sama landsstýrið alt annað enn rós fyri at hava handfarið málið so klossut og ómenniskjansligt nú at niðurleggja 8 búpláss og 7-8 ársverk á Suðuroyar ellis- og røktarheimi, áðrenn nýggja heimið er latið upp.

Somuleiðis er tað óskiljandi at landsstýriskvinnan ikki tók til eftirtektar fleiri hundrað undirskriftir úr Suðuroynni ið mótmæltu hesum ætlanum.

Hóast eg bert eri varamaður, og havi ikki fast sæti á tingi, vil eg gera landsstýriskvinnuni greitt, at eg ikki stuðli tær longur sum landsstýriskvinnu, og harvið heldur ikki samgonguni, um henda avgerð ikki verður broytt.

**Hesi avgerð míni fari eg at boða javnaðarflokkinum frá**